# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*



## Trongisvágsingur í Havn 60 ár

Týsdagin 13. januar rundar Kaj Pauli Mortensen tey seksti.

Kaj er føddur hin 13. januar 1949 á Brekkunum í Trongisvági. Hann er sonur Frits og Henrikku Mortensen.

Hann gekk í skúla á Tvøroyri, og sum 15 ára gamal fór hann í summarfrítíðini til skips fyri fyrstu ferð við Westward Ho. Hetta kveikti áhugan hjá honum fyri sjónum, og eftir at hava siglt við ymsum bátum m.ø. við Gudmundi av Tvøroyri saman við pápa sínum, fór hann til Havnar á navigatørskúla og gjørdist skipsførari á jólum 1972. Hann fór at sigla úti í stóru verð, til hann í 1976 gjørdist fyrsti skipari umborð á nýggja vaktar- og bjargingarskipinum Tjaldrið.

Í 1984 fór Kaj upp á land at arbeiða fyri landsskúlafyrisitingina. Tó slepti hann ikki sambandi við fiskivinnuna, tí hann arbeiddi burturav innan fiskivinnuøkjum. Hann hevur arbeitt í Fiskimálaráðnum í nógv ár, bæði sum fulltrúi og aðalstjóri í fiskivinnumálum, og arbeiðir hann í dag í Uttanríkisráðnum. Í hesum sambandi er hann komin víða runt í heiminum, tá fiskivinnusamráðingar hava staðið á skránni.

Kaj er giftur við Sigrun Mortensen, f. Jacobsen, úr Havn á 35 ári og saman eiga tey 4 børn og eitt abbabarn.

Kaj verður burturstaddur á 60 ára degnum.

Fyri 20 árum síðan:

## Skaðar fyri yvir 50 milliónir


tíðindablaðið
sosialurin
DÁLKI
Vit verða nervavrak

Í Sosialinum hósdagin 12. januar 1989 sigur sigur Sune Joensen, stjóri á Føroya Brunatrygging, at talið av skaðum eftir jólaódnina 21. og 22. desember í 1988 er komið upp um 2000. Hann vísir á, at fyribils metingin um at skaðarnir fara at kosta 50 milliónir, als ikki fer at halda. Hann roknar við at talið verður nógv hægri.

Blaðið skrivar eisini, at ruddinginav viðarlundunum er byrjað. Viðarlundirnar í Havn, Hoydølum, Selatrað og Kunoy hava fingið sera stóran skaða. Landsskógarvørðurin, Tróndur Leivsson, metir at tað eru átta ársverk hjá vonum fólki at rudda, umvæla og planta aftur-aftur.



*Skaðar fyri yvir 50 milliónir hendu í jólaódnini í 1988*



*Viðarlundirnar kring landið fingu stóran skaða*



### Prógv

Rógvi Absalonsen hevur 17. desember 2008 tikið prógv sum Master of Science in Culture and Society við London School of Economics and Political Science (LSE).

### Prógv

Tann 29. novembur 2008 fekk Rani Djurhuus Jakobsen prógv sum bachelor í Business Management & Administration frá University og Sunderland.



### Dagurin

**12. januar. Reinaldur**. Týskur riddari, sum gjørdist munkur í Köln, men varð myrdur sv steinhøggarunum umleið ár 1200, tá ið hann koyrdi undir teir í arbeiðinum at byggja eina kirkju. Týskt navn, sum merkir *tann, sum hevur vald á Gudum*

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum)*

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at góði maður, pápi, verfaðir, abbi og langabbi okkara

**Kristian Martin Johannessen**
vanliga nevndur Kristian í Miðstovuni á Sandi

andaðist á Landssjúkrahúsinum fríggjadagin 9. januar, 91 ára gamal.
Jarðarferðin verður úr Sands kirkju týsdagin 13. januar kl. 12.30.

*Fyri tey avvarðandi*
**Minni, Ásvør og Tórur**